# Leitivirksemið skipað so trygt tilber

**TRYGD** -Skuldi eitt óhapp kortini hent í sambandi við oljuboring við Føroyar, so hefta feløgini fyri møguligum avleiðingum sigur stjórin í Jarðfeingi

Jan Müller

Nú tað er komið fram, at grønlendska heimastýrið setir sera stór krøv til at oljufeløg, sum vilja bora í Grønlandi, veita eina trygd, áðrenn tey fara undir at bora hava vit spurt stjóran á Jarðfeingi, Petur Joensen, um krøvini føroyskir myndugleikar seta til trygd í sambandi við oljuboring eru nøktandi!

Petur Joensen sigur seg ikki hava nakra viðmerking til ásetingarnar í Grønlandi. Hann vísir annars til tann politikkin, sum føroyskir myndugleikar hava sett út í kortið á hesum øki.

-Treytirnar í Føroyum viðvíkjandi trygd í sambandi við oljuboring eru líkar teimum í grannalondum okkara. Hesi londini hava bygt sínar reglur við støði í royndum, metingum og váðagreiningum av virkseminum í áratíggjur. So vit meta, at virksemið er skipað so trygt sum tilber.

-Men hvussu skulu feløgini hefta, um eitt óhapp skuldi hent á føroyska landgrunninum?

-Skuldi tað hent, at eitthvørt óhapp kortini hendir, hefta øll feløgini í loyvissamtakinum fíggjarliga fyri neiligum avleiðingum. Formliga eru tey feløgini, sum eru loyvishavarar her, oftast dótturfeløg hjá stórum feløgum. Vit krevja tá í hvørjum einstøkum føri, at móðurfeløgini veita eina sonevnda "móðurfelagstrygd", t.e. at móðurfelagið veitir trygd fyri, at dótturfelagið kann uppfylla allar skyldur, ið kunnu standast av virkseminum.

Petur Joenen sigur víðari, at umframt at móðurfelagið heftir við sínum ognum, eru øll fyristøðufeløgini (operatørarnir) limir í OPOL. Hetta er eitt slag av tryggingarsfelagsskapi, ið dekkar upp til 250 mió. USD fyri hvørt óhapp.

Hann vil tó ikki útiloka, at føroysku treytirnar á hesum øki kunnu verða broyttar í framtíðini, um tað verður mett neyðugt.

-Grundað á tær drúgvu royndirnar við virksemi í grannalondunum, meta vit tí hesi viðurskifti nøktandi. Men hesi, eins og onnur viðurskifti viðvíkjandi oljuvirkseminum verða eftirmett frá tíð til aðra, so tað er ikki vist, at tær treytir, sum nú eru galdandi, ikki kunnu verða broyttar, um tað verður mett neyðugt sigur stjórin á Jarðfeingi.

*jan@sosialurin.fo*

# Grønland krevur stóra trygd

Jan Müller

Grønland krevur trygd frá oljufeløgunum uppá góðar 50 milliardir krónur, um ein verulig oljuvinna tekur seg upp. Hetta er tað, sum tað fer at kosta at rudda upp eftir eina oljuvanlukku visti útvarpið hjá Kringvarpinum at siga frá í vikuni.

Sambært útvarpinum er tað ikki eitt krav, at pengarnir verða settir á eina konto, men at trygd verður veitt fyri pengunum. Skotska oljufelagið Cairn mátti herfyri veita eina trygd uppá 10 milliardir dollarar fyri at bora í Grønlandi, og tað sama er galdandi fyri onnur oljufeløg, sum vilja leita eftir olju í undirgrundini sigur stjórin í grønlendsku ráevnisfyrisitingini, Jørn Skov Nielsen, sum eisini vísir á, at fleiri onnur oljufeløg hava víst áhuga fyri at leita eftir kolvetnum í Grønlandi.

*jan@sosialurin.fo*





MINKA UM ORKUNÝTSLUNA Í BÚSTAÐNUM

ORKULÁN

Vit veita fígging til orkusparandi tiltøk í sethúsum og íbúðum

Eigur tú hús ella íbúð, sum tú ætlar at endurnýggja ella umbyggja, er møguleiki at fáa lán frá Húsalánsgrunninum, um tiltakið er orkusparandi.

Húsalánsgrunnurin veitir fígging til m.a. bjálving, nýggj vindeygu, nýggjan húsklædning, nýtt tak, hitaskipan.

Vilt tú hava meira at vita um orkulán frá Húsalánsgrunninum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Ring ella støkk inn á gólvið Yviri við Strond, Tórshavn.

Húsalánsgrunnurin
Yviri við Strond 6 · 100 Tórshavn
Telefon 314583 · www.husalansgrunnurin.fo

ANNIJANNI

ÚTBJÓÐING

Ítróttarhøll á Sandoynni

Við hesum verður arbeiðið við nýggjari ítróttarhøll á Sandoynni boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út sum høvuðsarbeiðstøka.

Útbjóðingartilfarið, sum alt verður digitalt, kann bíleggjast hjá Landsverki frá mánadegnum 22. nov. 2010. Upplýsingar um virkið, búðstað, vinnutal, ábyrgdarpersón, t-postadressu, og telefonnr. skal upplýsast.

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegur 5, Tórshavn, mikudagin 22. Des. 2010 kl. 11.00.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

ÚTBJÓÐING

Stórkøkur til Ellis- og røktarheimið í Vági

Við hesum verður útbúnaður til stórkøkin í sambandi við omanfyri nevnda stovn boði út alment.

Lisitiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, týsdagin 30. november 2010 kl. 14.00

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsverk á 340 800 ella á sd@lv.fo í seinasta lagi mánadagin 22. november 2010 kl. 12.00

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*